


*Samferðslukervið er nógv broytt síðani ommudid fór til Havnar, men Barsskor er ein av teimum gomlu skipunum, sum framvegis tænir fyri seg*

*Framhald av síðu 21*

sum eru gjørdar í samferðslukervið í Kalsoynni, nær tað skal gerast nógv lagaligari at koma til og frá Svínoy, og nær Sandoy og seinni Suðuroy fara at koma uppí, og ikki minst nær tunnil fer at verða gjørdur av Skálafjørðinum og til Havnar. So má tað vera harvið, hvat danir hava hildið, halda og fara at halda um íløgurnar á samferðsluøkinum. Tær eru alneyðugar, um føroyingar heilt skulu koma úr skugganum frá tíðini, tá Ommudidda ferðaðist av Kirkju og til Havnar og til hús aftur. Landið er lítið, og einki eigur at verða spart fyri at gera tað so stórt, sum tað á nakran hátt ber til.

Danir kunnu ferðast yvir land eystur til Kina, og teimum nýtist neyvan at brúka krút, tá teir gera vegir. Tí munnu summir teirra hava ilt við at skilja trongdina til og týdningin og kostnaðin av íløgunum í føroyska samferðslukervið. Tey, sum hava ferðast í Svínoyarfirði, Fugloyarfirði, Vágafirði og Suðuroyarfirði í ótepsiligum líkindum, vita, hvat tað snýr seg um.

Tey, sum dag og dagliga í familju høpi, vinnuhøpi og í ferðing við og eftir vælferðartænastum, fáa gagn av samferðslukervinum, duga ikki at ímynda sær, at tíðin, sum hevur verið, skuldi komið aftur.

Spurningurin, hvussu føroyingar skulu fáa sum frægast burturúr stóru íløgunum á samferðsluøkinum, eigur ivaleyst at verða tikin til nýggja viðgerð. Tá fasta sambandið verður víðari, enn tað er í dag, fer spurningurin at stinga seg upp, hvussu ferðslan skal leggjast til rættis. Skulu almennu ferðamøguleikarnir mennast – betri bussar og títtari ferðir – ella skulu møguleikarnir hjá teimum privatu gerast betri. Fyri vágafólk og norðoyingar, sum skulu arbeiða í høvuðsstaðnum og búleikast heilt aðra staðni, fer tað at hava stóran týdning, hvussu umstøðurnar og kostnaðurin av at ferðast fara at verða. Politikararnir skulu taka støðu til tænastustøði og kostnaðarstøði hjá tí almenna, bensinprísir, oljuprísir, ferðaískoyti, ferðafrádrátt, bummpengar og skattafígging.

## Serfrøðin og serfrøðingarnir

Veruleikin er fasinerandi. Um fimm ár fer tað at bera til hjá gásadalskonuni at seta seg í bilin og koyra til Viðareiðis at keypa. Tað fer at bera til hjá henni, uttan at tað verður neyðugt, at nakar annar fer at blanda seg uppí. Akkurát soleiðis sum tað í dag er hjá teimum í miðstaðarøkinum.

Tað er stórur munur á ferðingini nú og í framtíðini og so at ferðast, tá Ommudidda var í Havn. Tá vóru nógv fólk uppií – bæði í ferðingini og við at hýsa henni og vinkonuni, sum tær ferðaðust suður og norðuraftur.

Eingin keta er sterkari enn veikasta liðið, plagar at verða tikið til. Heldur ikki ferðingarketan í Føroyum. Og her er tað, at eingilski sosiologurin Giddens, sum tað varð sipað til í yvirskriftini, kemur upp í leikin. Anthony Giddens, sum er føddur í 1938, hevur skrivað nógv, og hann hevur skrivað ella verið íblásarin til sumt av tí, sum tað nú eftir túsund ára skiftið verður undirvíst í sosiologi, eisini í hægru føroysku skúlunum.

Tá hann umrøður dynamikkin í nýmótans samfelagnum, kemur hann inn á álitið og ivan. Á fleiri økjum kenna føroyingar – bæði á Kirkju og serliga í Havnini – rákan frá super nýmótanst samfelagnum. Men samfelagsmynstrið fevnir samstundis heilt aftur til gamla bóndasamfelagið, tá tað var rætturin til jørðina, sum gav mátt og veldi.

At samferðslukervið nú á døgum er so væl ment, og at raksturin av ferjum, tunnlum, bussum, bilum, ferjulegum og samskifti annars gongur so væl, kemst av serfrøðini og serfrøðingunum, sum syrgja fyri, at elorka, maskinorka, navigatión, vegir, tunnlar, ferjulegur, kavarudding og alt annað er í lagi, so vit tora at hava álit á tí. Tá Ommudidda gjørdi sína Havnarferð, hevði hon álit á teimum, sum sigldu og fylgdu henni og vinkonuni millum oyggjar og bygdir. Tað bar eisini eina rúgvu av menniskjaligum sambondum við sær.

Nú rokna vit við, at alt er í lagi. Tað gera vit, tí royndirnar vísa, at serfrøðin syrgir fyri okkum. Tá so streymurin er burtur, vegirnir ikki verða grivnir ella bógskrúvan ikki megnar nógva vindin, so er alt á gosi. Og tað kemur illa við, tá spurnartekin verða sett við skipanirnar.

Ivin ber við sær, at ferðsla og ferðing mest sum steðga upp, og knyklar verða settir í brýr móti serfrøðini og serfrøðingunum. Ferðingin í luftini seinastu mánaðirnar er mest upplagda altjóða dømið um hetta. Men tað kemur eisini fyri, at tað kiksar her á klettunum. Og tað kennist serliga meint, tá kunningin kiksar til teirra, sum eru á ferð og rokna við, at alt er, sum tað eigur at vera. Tíverri kemur tað fyri, at hesi eru tey seinastu at verða kunnað um kiksararnar.

## Veruleikin og veikleikarnir

Giddens tosar um, at gongdin hevur við sær, at menniskju gerast fremmand fyri hvørjum øðrum. Ommudidda hevði samband við fólk á Norðtoftum, í Árnafirði, á Norðoyri, í Klaksvík, í Leirvík, í Gøtu, í Sølmundarfirði, og á Toftum á veg til Havnar. Á veg norður aftur kom hon umframt tey flestu av hesum eisini í hóslag við hoyvíkingar, glyvrafólk, tey á Syðradali, á Húsum, í Kunoy og á Skarði, áðrenn hon og tann, hon var í ferðalagi við, komu aftur í Hvannasund, hagani tær vórðu settar út aftur á Kirkju.

Í nútíðini ber tað til at liva, arbeiða og ferðast uttan at koma í prát við nakað menniskja. Men tað ber bara til so leingi, sum serfrøðin hevur syrgt fyri, at alt gongur, sum tað skal. Tíbetur gongur tað oftast sum klokkan. Men tað eigur ikki at hava við sær, at prátið og hugleiðingarnar undir ferðing, sum áður vóru so týdningarmiklir partar av ferðingini, detta burtur. At hitta og tosa við fólk umborð á ferjunum hjá strandferðsluni er so vælsignað. Tað ræður um at nýta hesar løturnar, meðan tær eru. Tað verður so skjótt, at strandferðsluskip fara at verða sum lundi á jólanátt fyri flestu føroyingar. Tað vóru tey eisini, tá Ommudidda fyri knøppum 110 árum síðani gjørdi sína einastu ferð til Havnar. At frágreiðingin um ta ferðina er rammað inn og altíð fer at minna føroyingar á, hvussu stórt skarvslopið í menningini av samferðsluni hevur verið, kunnu vit takka Hans Mikael Jacobsen, sála, fyri.

Gott nýggjár.




# Skips Sosialurin
## - TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK






**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri, at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðla Skips Sosialin hevur KAUPTHING Føroyar Virðisbrævameklarafelag

**Tíðindablaðið**
**Sosialurin** Box 76 110 Tórshavn

**ÓKEYPIS**
**Sosialurin rindar postgjaldið**
**64**

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum, og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982**
**ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgava ( uttan útskrift )*
☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin